# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## John Petersen nærkast B36



Tað er meira ella minni greitt, at John Petersen verður venjari hjá B36 næsta kappingarár. Fyrrverandi landsliðsframherjin hevur verið í samráðingum við felagið leingi, og nú er stutt eftir á málið, skilst. Leysasøgurnar hava leingi verið, at John Petersen og Mikkjal Thomassen skuldu standa á odda fyri liðnum í ár. Teir hava hinvegin sett sum krav at síggja endaliga hópin, áðrenn teir tóku av tilboðnum. B36 hevur mist fleiri týðandi spælarar, og tað er framvegis ikki greitt, um Dmitrije Jankovic og Herbert í Lon Jacobsen halda fram. Árstalsfelagið hevur longt sáttmálarnar við fleiri av stuðulsleikarunum, og um vikuskiftið var greitt, at Lukasz Cieslewicz er knýttur at hópinum. At John Petersen verður partur av venjaratoyminum er meira ella minni greitt, sum Sosialurin skilir.

# Viljormur heldur fram




**FÓTBÓLTUR** Viljormur Davidsen, sum hevur sáttmála í OB, men síðani september hevur verið útleigaður til FC Fyn, tekur eitt hálvt ár afturat í næstbestu donsku deildini

**Rólant Waag Dam**

Hann váttar, at hann og FC Fyn hava longt um avtaluna fram til summar. Føroyski verjuleikarin skal tískil royna at hjálpa FC Fyn í stríðnum undan niðurflyting.

Viljormur Davidsen, sum spælir á føroyska U21-landsliðnum, er fastur maður á liðnum hjá FC Fyn. Í felagnum eru teir fegnir um, at runavíkingurin heldur fram, og tað er hann eisini sjálvur.

– Mær dámar væl her, og eg havi spælt fast á besta liðnum sum vinstri bakkur. Tað er spennandi og avbjóðandi, og mær dámar væl at spæla hvønn dyts í næstbestu deildini, sigur Viljormur Davidsen.

Hópurin hevur verið í vetrarfrí, men venjingin byrjar aftur í dag. Við í venjingini verður Bjarni Jørgensen, sum fer at royndarvenja við liðnum næstu dagarnar.

*rolant@sosialurin.fo*



*Savnsmynd*

# Jørgensen royndar-venur við Fyn

**FÓTBÓLTUR** Bjarni Jørgensen fer at royndarvenja við FC Fyn í næstbestu donsku deildini í dag

**Rólant Waag Dam**

Bjarni Jørgensen spældi við EB/Streymi í fjør. Hann fór til Danmarkar fyri nøkrum mánaðum síðan í lestrarørindum, og hann er nú bjóðaður at royndarvenja við felagnum á Fyn í dag.

– Eg havi ikki hugsað so nógv um fótbólt, síðani eg fór niður, men nú fekk eg hendan møguleikan, og eg havi valt at royna tað. Eg havi vant eitt sindur fyri meg sjálvan, og eg meti, at eg eri hampiliga væl fyri kropsliga, sigur Bjarni Jørgensen, sum ofta hevur verið darvaður av skaðum.

FC Fyn er í tungum sjógvi í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Liðið er næstaftast og vantar trý stig fyri at sleppa upp um niðurflytingarmarkið. Tí kemur væl við, at nýggir mans royna seg í felagnum.

Næstbesta danska deildin byrjar aftur í mars.

*rolant@sosialurin.fo*

## Miðlarnir skriva:

»Sum spælari kann Lukasz røkja flestu framrættaðu pláss á vøllinum, men sjálvur trívist hann best sum fremsti partur av sentrala miðvøllinum. Hann er sterkur, hampuliga skjótur, og so hevur hann eisini eitt rættiliga gott skot, sum vit vónandi koma at síggja nógv til komandi árið.«

*www.b36.fo*

»Nýggi maðurin hjá Kyndli, Karl Jóhan Djurhuus, og Erlendur Johannesen í málinum spældu ein branddyst, tá Kyndil í dag vann 22-18 á H71 í Hoyvík í dag. Karl Jóhan steinaði átta bóltar í málið, og Erlendur bjargaði atsóknum upp á strípu. Hans Áki skeyt sjey góð mál«

*www.kyndil.fo*

»10 minuttir klinkaðu – restin stinkaði. Sum vanligt byrjaðu vit frálíkt. Alt gekk upp á stás, stórsiður var væntandi og lagið var gott. Síðan stagnatión, forvirringur, kiks og tap. Nakað soleiðis kundi dysturin verðið lýstur í stuttum.«

*www.h71.fo*

»Men í ár sær tað út til at púra einki verður gjørt burtur úr hesum, hvørki í okkara almenna Kringvarpi Føroya, ella í teimum privatu miðlahúsunum. Miðlahúsið hevur júst avgreitt ársins Planet Awards, til at heiðra fólk í tónleikavinnuni, men ger eftir øllum at døma einki burtur úr ítróttinum. Dimmalætting nevnir einki um nakað ársins yvirhøvur, og Kringvarpið er eisini tigandi.«

*www.svimjing.com*
*um at ársins ítróttarfólk ikki er kosið*